# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Karin Poulsen 70 ár

Tann 2. juli verður Karin Poulsen, Klaksvík, 70 ár.

Karin er dóttir til Annu og Johannes Nolsøe, hon er ættað úr Gøtugjógv og hann er ættaður úr Vestmanna.

Tey settu búgv í Klaksvík, og har er Karin so fødd.

Aftaná lokna skúlatíð, og á háskúla í Danmark, fór Karin á lærarskúla í Havn. Hon tók læraraprógv í 1960. Tað fyrsta árið arbeiddi hon í skúlanum við Gøtugjógv, men síðani tá við skúlarnar í Klaksvík. Har arbeiddi hon so fram til 1995, tá ið hon fór frá við eftirløn.

Í 1965 giftist hon við Kára Poulsen, undir Gøtueiði, kendur sum Kári av Skipanesi. Tey fingu 4 børn. Tvíburðar í 1966, dreingir, Árni og Jóannes, í 1967 fingu tey dóttrina Onnu Mariu og í 1973 yngsta sonin Sjúrður, sum doyði í 1991 av ferðsluvanlukku.

Karin hevur alt sítt lív verið ein sera Guðsóttandi kvinna, og hevur hetta



merkt hana, hvar ið hon so er. Tey børn ið hon hevur havt í skúlanum, hava altið fingið eitt Guðsorð við á vegnum. Hon er trúføst í kirkju og á møti í Emmaus hvønn sunnudag, saman við manni sínum. Tað liggur henni tungt á hjartað at boða um "Jesuspápa"

Hon hevur tey nógvu seinastu árini verið trúføst úti í Dagtilhaldinum fyri eldri. At verða saman við eldri fólki er nakað henni dámar sera væl, at fáa lut í teirra lívsvitan. Saman við manni sínum, koma tey nógv í tey ymisku sambýlið og røktarheim, ið eru her í Klaksvík, at njóta eina løtu saman við teimum gomlu. Stundum halda tey andakt saman við teimum.

Tvey ommubørn hava Karin og Kári, Karin, ið er 8 ár og Pravin, ið er 2 ár. Tey hava nógv at týða fyri hana, og eisini har leggur hon stóran dent, at siga teimum um Jesuspápan.

Sjálvan føðingardagin 2 juli, eru Karin og Kári burturstødd.

## Andlát og jarðarferðir

Anna Geyti, andaðist týsdagin 28. juni í Saltum í Danmark, 87 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Saltum kirkju leygardagin 2. juli klokkan 13.

Holgar Jacobsen í Klaksvík, vanliga nevndur Holgar í Búðunum, andaðist mánadagin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 75 ára gamal.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

Anna Jespersen, Tvøroyri, andaðist á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi sunnudagin 26. juni, 81 ára gomul.

Kistan fór úr kapellinum mikukvøldið klokkan 18 í Tvøroyrar kirkju.

Gravarferðin verður í dag, hósdagin klokkan 13.

Tey, ið vilja minnast Annu, kunnu lata Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi eina gávu. Konto í Suðuroyar Sparikassa.

## Eingin stevna uttan list

**Fuglafjørður:** Málningaframsýningin á Varmakeldu letur upp í fimleikarhøll skúlans fríggjadagin 1. juli kl. 16. Brøðurnir Johan og Rúni Hentze spæla á trompet, tá framsýningin letur upp.

Leygardagin 2. juli letur framsýningin upp kl. 15. Tá spælir Sune Vejlby Brogard, pianistur, klaver.

Framsýningin letur upp aftur sunnudagin 3. juli. kl.15. Tá fara systkini Jósef og Lív Olsen at spæla klaver. Jósef vann heiðursmerki í danskari klaverkapping, Berlingske Tidendes klaverkapping, fyrr í ár. Málningaframsýningin á Varmakeldu er opin allar varmakeldudagarnar til kl. 20.

Við á málningaframsýningini eru listafólk bæði úr Fuglafirði og aðrastaðni.

## Norsk vitjan á summarstevnuni

**Árliga summarstevnan hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum byrjar í Skúlanum við Ósánna í Klaksvík í kvøld og varir fram til 3. juli**

STEVNUR
*Snorri Brend*

**Klaksvík:** Høvuðstalari er Norvald Yri úr Norra, sum er bíbliuskúlalærari á Fjellhaug Skoler. Kona hansara, Anna, sum er lektari í sjúkrarøktarvísind á Høgskolen í Oslo, luttekur eisini.

Byrjað verður í kvøld kl. 20 við møti í Emmaus, har evnið er: "Er kristindómurin útgingin?"

Fríggjamorgunin verður bíbliutími kl. 10.30.

Frá og við seinnaparti fríggjadagin eru møtini í Skúlanum við Ósánna. Fyrst missiónsmøti kl. 16, har Norvald Yri talar og Anna Yri og Anne-Lene Olofson greiða frá arbeiði teirra í Afrika. Kl. 19.30 er møti við evninum: "Gud talar til tín persónliga", har Petur Hans og Thomas syngja.

Leygarmorgunin er fyrst bíbliutími kl. 10.30. Eftir døgurða er gongutúrur og kl. 16 er møti við Leivi Nattestad.

Um kvøldið er møti aftur kl. 19.30 við evninum: "Er vón fyri einum sum mær?", har Askham syngur, og ungdómsmøti kl. 22, har evnið er: "Vilt tú veruliga til himmals?"

Sunnumorgunin kl. 11 verður gudstænasta við altargongd í Christianskirkjuni, har Norvald Yri prædikar. Kl. 15 er familjumøti í skúlanum, har børn úr Emmaus syngja.

Summarstevnan endar við felagsmøti við KFUM &K í Christianskirkjuni kl. 18. Evnið er "Enn er rúm" og kórið í KFUM&K syngur.

### 75 ára føðingardagur

Hósdagin 30. juni fyllir Torleif Simonsen í Sandavági 75 ár. Føðingardagurin verður hildin heima.

### 70 ára føðingardagur

Hósdagin 30. juni fyllir Olfert Debes, Oyri, 70 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá ið elskaði maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Elibert Kirke**
Saltnes

andaðist og varð jarðaður.

Ein serstøk tøkk til starvsfólkið í Gøtubrá, fyri hjálpsemi og umsorgan.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Hjartans tøkk til øll tykkum, sum hjálptu til á ymiskan hátt.
Tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jenny, John, Asta, Elsa og Jaslei**